Nr. 4/2020

Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52a

Fyrispurningur um Karlstad-skipanina á Sernámi, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52a).

1. Heldur landsstýrismaðurin, at Karlstad-skipanin í nóg stóran mun verður raðfest á Sernámi?
2. Heldur landsstýrismaðurin tað vera í lagi, at tað er ójavnt, í hvønn mun fólk fáa tilboðið, alt eftir hvar í landinum tey búgva?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað meira ítøkiligt við málið?
4. Hvørjar eru framtíðarætlanirnar við Karlstad-skipanini?
5. Hevur landsstýrismaðurin eitt nú ætlanir um at útbúgva fleiri ráðgevar á økinum?

Viðmerkingar:

Vit frættu áðrenn summarfrítíðina um nøkur foreldur, sum vóru sera kedd um, at ein vælvirkandi tænasta til børn teirra á Sernámi skuldi niðurraðfestast.[1] Talan er um sonevndu Karlstad-skipanina, ið er eitt amboð, sum stuðlar undir menningina av mál-, talu- og samskiftishættum hjá børnum og vaksnum. Avleiðingarnar vóru sambært foreldrunum, at tað í dag eru fleiri børn, sum onga hjálp fáa eftir Karlstad-skipanini, og at tey fáu, sum fáa hjálp, fáa ov fáar tímar.
At kunna samskifta verður ofta sætt sum ein tann mest grundleggjandi førleikin, vit sum menniskju hava, og hevur hann tí stóra ávirkan á lívsvirðið hjá tí einstaka. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 11. august 2020

Djóni Nolsøe Joensen

[1] Kringvarp Føroya, 2020, Hjálpin frá Sernámi er sera vánalig. Leinki: http://kvf.fo/netvarp/sv/2020/06/29/20200629hjalpinfrasernamierseravanalig